LM-011/2025

Javnstøðu nevndin

Tórshavn 8. august 2025

Løgmálaráðið

Gongin 7

110 Tórshavn

Att.: Elsa Magnussen, fulltrúi

Sent til: lmr@lmr.fo

Ummæli

Javnstøðunevndin hevur fingið til ummælis uppskot til broyting í løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin).

Javnstøðunevndin tekur yvirskipað undir við uppskotinum og hevur hesar viðmerkingar annars:

Við tað at tað einamest er viðkomandi sjálv ella sjálvur, sum ynskir at steriliserast, ið best kennir til sína egnu støðu, er tað sami ella sama viðkomandi, ið tískil hevur bestan førleika til at taka avgerð um sterilisatión. Javnstøðunevndin tekur undir við, at hendan meginreglan – uttan at gera mun á kyni - verður sett í verk sambært uppskotinum.

Javnstøðunevndin metir lógaruppskotið vera eitt stig á røttu leiðini, serliga tá tað ræður um áseting um, at øll yvir 25 ár uttan mun til kyn fáa ræðisrætt til at velja sterilisatión.

Vegna Javnstøðunevndina

Brandur Mortensen Nolsøe, skrivari